

www.oljan.fo

**Jan Müller** 03 - 11 - 2012

# Norðmenn tjena 1,8 mia. um dagin

Pengarnir renna í norska Oljugrunnin. Roknskapurin fyri triðja ársfjórðing vísir, at vinningurin í hesum tíðarskeiðinum var heilar 167 milliardir krónur ella 1,8 milliard krónur um dagin. -Tað er í stóran mun hækking á altjóða virðisbrævamarknaðunum, sum hevur givið grunninum tann góða vinningin, sigur stjórin, Yngve Slyngstad. Hann sigur, at tann størsti vøksturin var í Evropa, har grunnurin hevur umleið helmingin av sínum íløgum.